tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Aftur dumpaði Strandferðslan

Oddagrein

So hendi tað aftur. Aftur mikumorgunin dumpaði Strandfaraskip Landins í tænastu og upplýsing. Og einaferð afturat má ásannast, at landsstýrið - sum jú hevur ábyrgdina í síðsta enda - er ikki búgvið at umsita tey stóru málsøkini sum Strandferðslan, Postverkið og Heilduverkið eru.

Eftir tí ferðaætlan, sum Strandfaraskip Landsins hava latið fólki, nú ferju- og farmaskipið Claymore siglir um tann streymharða Suðuroyarfjørð, stendur greitt: Av Drelnesi - Onsdag kl. 7.00. Eingi viðmerking sum t.d. ávísing til vanligu ferðaætlanina hjá Strandferðsluni ávísar dagar. Tað kundi verið sett upp á eykaferðaætlanini, sum er útflýggjað fólki.

Men gjáramorgunin, sum í hugaheiminum hjá flestu suðuroyingum og føroyingum var ein vanligur mikudagur, fór Claymore frá bryggju á Drelnesi klokkan 6 - ella ein tíma fyrr enn ásett í útflýggjaðu ferðaætlanini. Avleiðingin var, at tá fólk komu á Drelnes áðrenn klokkan 7, var eingin Claymore, tí tá var hann komin norður um Stóru Dímun.

Eitt er, at hurlivasi tekur seg upp, tá eitt avloysaraskip verður sett at sigla og ein nýggj ferðaætlan verður sett í gildi. Men eitt annað er, at hetta endurtekur seg nú tríggjar vikur, eftir at avloysaraskipið fór at sigla. Hetta líkist púrasta ongum og slíkt eigur at fáa myndugleikarnar at rannsaka seg sjálvar. Tað veri seg bæði í Vinnumálastýrinum og á Strandfaraskipum Landsins.

Á hesum stað hevur áður verið víst á, at tað er politiski myndugleikin, sum hevur avdúkað sín ódugnaskap í samband við, at avloysaraskip skuldi fást fyri Smyril. Hetta komst av, at málið varð tvinnað saman við eykajáttan til Strandfaraskip Landsins. Men her skal vera víst á, at tað er ikki vanligt, at Strandferðslan søkir um eykajáttan til eitt avloysaraskip fyri t.d. Smyril.

Hetta merkir, at ábyrgdin eisini liggur á sjálvum stovninum. Í øllum førum er tað stovnurin, sum ikki veitir nóg góða tænastu og upplýsing. So sent sum týsdagin upplýsti Strandferslan, at Claymore sigldi klokkan 7, hóast hann fór klokkan seks. Harafturat skilst, at so seint sum mikumorgunin var upplýsingin á Strandferðsluni ikki kunnað um hurlivasan. Hesi viðurskifti má stovnurin fáa upp á pláss, tí slíka tænastu kann ein almennur stovnur ikki bjóða fólki í hesum samskiftistíðum.

Sosialurin

Viðmerking:

Nei, nei, nei, nú er nóg mikið!

Tað er ikki minni enn ein gøla, at olju og bensinprísirnir eru so himmalhøgir - serliga orsaka av einum risahøgum oljuavgjaldi og MVG hjá fullveldissamgonguni.

Brennioljuavgjaldið átti at verið avtikið - sum Sambandsflokkurin ætlaði: Sambandsflokkurin legði í vár fram uppskot um at avtaka oljuavgjaldið, tí vit sóu hvønn veg leiðin bar - nevniliga drepandi oljuprísir. Vit fingu rætt. Vanligi føroyingurin hevur nú nærum ikki ráð, hvørki at koyra til arbeiðis ella at hava hitan í egnum húsum. Tað er neyðugt, at løgtingið aftur tekur upp spurningin um at taka av oljuavgjaldið í komandi tingsetu. Tí borgarin hevur fyrsta prioritet her á landi - ikki Landskassin, sum samgongan tykist halda.

Prísirnir skulu niður-nú: Benzinprísirnir fara skjótt at kosta meira enn 10 krónur liturin. Dieselprísirnir eru hækkaðir nógv og eru methøgir. Oljuprísir til hús og virkir eru høgir sum ongantíð áður.

Alt orsaka av, at landskassin undir Fólkaflokksløgmanni og øðrum fullveldisfólki, onki gera fyri at lækka avgjaldið og byrðuna hjá fólki sum her býr. Uppskot Sambandsfloksins um at avtaka brennioljuavgjaldið hevði loyst stóran part av hesum trupulleika. *Men samgongan feldi okkara uppskot og kom við sínum egna uppskoti,ið tvørturímóti hækkaði avgjaldið.At teir høvdu hjarta til tað er óskiljandi!*

Ístaðin fyri at stýra landinum, so fjasast teir við at loysa. Tann undan valinum lovaði lættin er ein býur í Kina, ímeðan órímiligar dagligar avgjaldshækkingar eru veruleikin fyri føroyingin ídag.

Borgarin knokkroyttur:
Hendan samgonga savnar saman í løgur, við at knokkroyta borgaran við skattum og avgjøldum. Meirvirðisavgjaldið og brennioljuavgjaldið eru týðulig dømir um hvussu hækkingarnar raka borgaran beinleiðis. Teir vita at hækkingarnar geva nógv í Landskassan - orsaka av nærum drepandi høgum avgjøldum. Teir vóru bangnir fyri, at oljuprísirnir fóru at hækka og tí fastfrystu teir oljuavgjaldið. Soleiðis tryggjaðu teir, at Landskassin framhaldandi fekk sín alt ov stóra avgjaldspart øktan - við at tøma enn meira úr lummanum á føroyinginum.

Diesel og benzin avgjøld eiga eisini at lækkast: Tað er neyðugt, at ein loysn eisini verður funnin, soleiðis at benzin og diesel prísirnir lækka. Tað einasta vit kunnu gera her á landi, er at lækka landskassa avgjøldini á hesar vørur, og møguliga eisini seta loft á

hámarksvinning hjá oljufeløgunum.

Hiti í húsum og akfør neyðug í vælferðarsamfelagnum:
Tað er neyðugt hjá fólki at hava bil ídag fyri at koma aftur og fram til arbeiðis, umframt at hava eitt socialt lív eftir arbeiðstíð, keypa inn og líknandi. Bilurin er ein fortreyt fyri vælferðarsamfelagnum,ið setir stórt krav til eitt gott veganet, har ferðslan kann koma skjótt og ótarna fram.

Avgjaldspolitikkur landstýrisins ger, at tað skjótt er óneyðugt at hava nakrar vegir. Tí fáur fer skjótt at hava ráð at fylla benzin í akfar sítt, orsaka av køvandi avgjøldum Landstýrisins eins og illvilja til at gera nakað við at lækka hesi, so ferðslan eftir vegunum kann gerast so bílig sum gjørligt fyri brúkaran og veljaran. Er ætlanin hjá loysingarsamgonguni, at føroyingar aftur skulu til at brenna torv fyri at halda fløvan í egnum húsum? Um onki verður gjørt, verður tað helst tað,ið fleiri borgarar verða *noyddir* at gera.

Føroyingar reisist:
Nú er tíð uppá at allir føroyingar reisast í vreiði og gera vart við sína ónøgd. Tí atkvøðurnar fingu teir við at lumpa veljaran - við at lova avgjaldslækkingar - ið nú eru stórar hækkingar. Ístaðin fyri at stýra til gagn fyri borgaran, so stýra teir til stóran skaða fyri bæði land og fólk við hækkandi avgjøldum - hækkandi avgjøldum__.

Vit kunnu ikki finna okkum í meira.

Avgjøldini skulu niður - av einari orsøk: Tey eru ov høg. Tað er nóg mikið hjá landskassanum at fáa heimsins hægsta MVG av benzini, diesel og olju. Lætti um hjá føroyingum, heldur enn at koma við fleiri køvandi fullveldishækkingum.

Vinarliga Marjus Dam,
løgtingsmaður

Løgreglan farin at klippa nummarplátur

Løgreglan í Havn hevur fingið boð um at klippa pláturnar av út við hundrað bilum í Surðurstreymoy. Tað kostar fólki 500 krónur at fáa nýggjar plátur

EIRIKUR LINDENSKOV

Tey, ið enn ikki hava goldið vegskatt, hava kanska ein evarska lítlan møguleika eftir - og tað er, um tey gjalda beinanvegin.

Jákup Alberg Berg á politistøðini í Havn sigur, at støðin hevur fingið eina lista frá Gjaldstovuni við út við 100 bilum úr Suðurstreymi, sum ikki hava goldið vegskatt.

Og tá er bara eitt hjá løgregluni at gera - at klippa pláturnar.

Jákup Alberg Berg sigur, at teir helst fara út um náttina, tí tá er lættari at finna bilarnar.

Men um so er, at fólk gjalda beinanvegin, so er ein møguleiki at sleppa undan at missa pláturnar. Men tá mugu fólk sjálv boða løgregluni frá hesum.

Verða pláturnar kliptar, mugu fólk gjalda 500 krónur eyka fyri at fáa nýggjar plátur frá Bileftirlitinum.

Løgreglan fer nú út at klippa nummarplátur av bilum hjá fólki,ið ikki hava goldið vegskatt
Mynd: Álvur Haraldsen

Arbeiðið at gera vegirnir til Vágatunnilin undir land:

J & K Petersen fáa arbeiði fyri milliónir

Teir hava ikki tað lægsta tilboðið. Men teir fáa arbeiðið eftir eini heildarmeting, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunlinum

Arbeiðið at gera vegirnar til undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi byrjar í summar. J.& K. Petersen høvdu ikki tað lægsta tilboðið, men fingu arbeiðið kortini útfrá eini heildarmeting, sigur stjórin fyri P/F Vágatunnilin

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað verður Byggifelagið J&K, sum fær arbeiðið at gera vegirnar til undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi.

Hetta tykist greitt, nú leiðslan í P/F Vágatunlinum hevur tikið støðu til tilboðini, sum eru komin inn.

Eftir at hava granskað tilboðini, hevur leiðslan í Vágatunlinum gjørt av at taka samráðingar upp við J&K Petersen sum arbeiðið.

Talan er um eitt rættiliga stórt og umfatandi arbeiði.

Arbeiðið varð boðið út í innbodnari lisitatión, men tað var rættiliga stórur munur á tilboðunum, sum komu inn, tí tað dýrasta tilboðið var næstan tvær ferðir so høgt sum tað bíligasta.

Tilsamans lógu tilboðini úr 22 milliónum upp í 41,5 milliónir fyri alt arbeiðið.

Arbeiðið varð boðið út í trimum arbeiðstøkum.

Ein arbeiðstøka var at gera vegin í Leynum á Streymoyarlandinum, ein at gera vegin á Vágalandinum og tann triðja arbeiðstøkan var at taka upp og rudda byggiøkið í Leynum aftaná at undirsjóvartunnilin er liðugur.

Størsta arbeiðið er at gera vegin á Vágalandinum.

Tað umfatar at gera veg uppá einar tveir kilometrar úr tunlinum til landsvegin, umframt at fyrireika inntakið til sjálvan tunnilin.

Lægsta tilboðið upp á tað arbeiðið var upp á 16 milliónir og hægsta tilboðið var upp á 28,8 milliónir.

Ein arbeiðstøka umfataði arbeiðið at gera brúgv um Leynará Streymoyarlandinum og eina rundkoyring, umframt ein veg uppá einar 300 metrar til tunnilin.

Lægsta tilboðið upp á tað arbeiðið var upp á 4,9 milliónir og tað dýrasta tilboðið var upp á 10,5 milliónir.

Og triðja arbeiðstøkan var arbeiðið at rudda arbeiðsplássið aftur, aftaná at allur undirsjóvartunnilin er liðugur og tey tilboðini lógu ímillum 1,1 og 2,2 milliónir.

Ikki lægsta tilboðið

Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunlinum, vil bara upplýsa lægsta og hægsta tilboð upá tær ymsu arbeiðstøkurnar. Hann vil tískil ikki siga, hvussu nógv hvør einstakur arbeiðstakari hevur boðið uppá hvørja av teimum trimum arbeiðstøkunum.

Men tað skilst at tilboðið hjá J&K Petersen var ikki tað tað lægsta.

Og tað er fallið byggikønum fyri bróstið, at leiðslan í P/F Vágatunlinum ikki hevur tikið av tí lægsta tilboðnum, serliga tá ið arbeiðið varð boðið út í innbodnari lisitatión.

–Tað er heilt óvanligt ikki at taka av tí lægsta tilboðnum, tá ið eitt arbeiðið er boðið út í innbodnari lisitatión, sigur byggikønur

Stjorin í P/F Vágatunlinum váttar, at tilboðið frá J/K Petersen var ikki tað lægsta.

–Men tað var ímillum tey lægstu tilboðini, sigur hann.

Hann vísir eisini aftur, at tað skal vera so óvanligt ikki at taka av tí lægsta tilboðnum, hóast eitt arbeiðið er boðið út í innbodnari lisitatión,

– Tað er ikki heilt óvanligt, sigur hann.

Hann sigur, at tá ið arbeiðið varð boðið út, tilskilaði nevndin fyri Vágatunlinum sær rætt til at velja og vraka ímillum tilboðini.

– Og tá ið vit hava gjørt av at taka samráðingar upp við J&K Petersen, er tað útfrá eini heildarmeting.

Dávur Reinert Hansen sigur, at tað er ikki bara prísurin, sum er avgerandi.

–Men samstundis verða metingar gjørdar av, hvat er tað besta tilboðið sum heild fyri byggiharran. Og tað er útfrá hesi heildarmetingini, at vit hava gjørt av taka samráðingar upp við J&K Petersen fyrst

Dávur Reinert Hansen sigur, at talan var um metingar av, hvussu arbeiðið kann fullførast, hvussu arbeiðið verður samskipað við onnur arbeiði o.s.fr.

Hann sigur, at ætlanin er at avgreiða samráðingarnar uppá nakrar fáar vikur og so er ætlanin er, at arbeiðið skal byrja í summar.

–Ætlanin er í fyrstu syftu at gera arbeiðsveg í Vágum til inntakið til tunnilin.

–Tað skal vera liðugt seks mánaðir eftir, at tunnilsarbeiðið er byrjað og ætlanin er, at tað skal byrja í august, september í ár.

Annars er tað tilfar úr tunlinum, sum skal brúkast til vegirnar, so teir verða gjørdir samstundis, sum vit borað, sigur Dávur Reinert Hansen.

Hevði tað lægsta tilboðið:

Fara víðari við málinum

Byggitek hevði lægsta tilboðið at gera vegirnar í sambandi við undirsjóvartunnilin, men sleppur ikki upp í part kortini

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað var Byggitek í Havn, sum hevðiu lægsta tilboðið uppá at gera vegirnar í sambandi við undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi.

Men hóast tað, er leiðslan í P/F Vágatunlinum farin at samráðast við J&K Petersen um arbeiðið - sí greinina omanfyri.

Tummas Sørensen, stjóri í Byggitek hevur ikki so nógvar viðmerkingar til málið í løtuni.

Men hann váttar, at hann hevði lægsta tilboðið upp á vegirnar í sambandi við undirsjóvartunnilin.

– So er leiðslan í P/F Vágatunlinum farin at samráðast við J&K Petersen, er hon á heilt skeivari kós, sigur hann.

Hann sigur, at tað er ongin orsøk til at betala meiri fyri eitt arbeiði enn neyðugt.

– Og tá ið eitt arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión, er tað heilt, heilt óvanligt ikki at taka av tí lægsta tilboðnum.

Hetta kemst av, at tá ið eitt arbeiði verður boðin út í innbodnari lisitatión, verða tær fyritøkurnar, sum verða boðin at verða við í innbjóðingini, mettar og vigaðar, áðrenn tær sleppa upp í part og verða bidnar um at vera við

Virkini, sum bjóða, eru tí longu frammanundan góðtikin av byggiharranum sum fult før fyri at útinna arbeiðið.

Men, eftir hvat skilst, er seinasta orðið ikki sagt enn, tí Byggitek er ikki sinnað at sleppa málinum uttan víðari.

Tvørturímóti sigur Tummas Sørensen, at tey arbeiða víðari við málinum, sum hann málber seg.